## Aðrir bólkar á ólavsøkukonsertini

**Go Go Blues**

Prixvinnararnir vera aftur í Føroyum á ólavsøku eftir eina uttanlandsferð, har teir millum annað vitja Kanada. Hetta er ein blúsbólkur í toppformi, og føroyingar kunnu gleða seg til aftur at sleppa at njóta blúsin hjá Una, Rógva og Arnold í Kommunuskúlagarðinum.

**Dejavu**

Dejavu góvu fyrr í ár sína fyrstu fløgu út. Talan er um eitt stórverk, sum bólkurin hevur arbeitt við í fleiri ár. Droymandi rokktónleikurin hjá bólkinum hevur givið teimum nógvar fjepparar í øllum aldrum, og annað pláss í Prix Føroyar finaluni 2003 borgar fyri góðsku.

**Eager to Please**

Eager to Please gjørdu vart við seg í triðja undanumfarinum til Prix Føroyar í ár. 70'ára kendi rokkurin hjá bólkinum, var ótrúliga gjøgnumførdur og vælspældur. Bólkurin, sum hevur sínar røtur í nú deyða rokkrisanum Fluffy Toys, hevur síðan prixið spælt nógv kring Føroyar, eitt nú á Sundalagsstevnuni og sum endabrestur á Mentanarnáttini í Havn. Her er talan um eitt veruligt rokkshow.

**Paradox**

Garrvilli punkbólkurin Paradox vann Pop Top konsertina í fjør, og gjørdist ein av stóru moralsku vinnarunum í Prix Føroyar kappingini. Síðan prixið er bólkurin vorðin kongaligur hoffleverandør, tá Fríðrikur krúnprinsur og Mary krúnprinsessa vitjaðu Margarinfabrikkina, spældu Paradox fyri teimum, og at døma eftir smílinum hjá Fríðriki, fall punkurin væl í oyra hjá krúnprinsinum.

**Synararchy**

Harði og villi rokkbólkurin Synarchy verða fyrstir á pallin á ólavsøku. Tað er vorðin siður, at tann bólkurin, sum vinnur Pop Top konsertina, sleppur at lata ólavsøkukonsertina upp. Umframt at vinna Pop Top konsertina hava Synarchy luttikið í Prix Føroyum og fingu heilt góða móttøku av áhoyrarunum.

**Side Effect**

Brynjolfur á Heygum er heilin aftanfyri Føroya einasta tekno-rokkbólk, og her er talan um so stórar tónlistarligar gávur, at tað bara er spurningur um tíð, áðrenn ungi havnardrongurin verður eitt heimsnavn. Men enn eiga vit Side Effect fyri okkum sjálvi, og meðan vit bíða eftir fyrstu fløguni hjá bólkinum, sum væntandi kemur í heyst, kunnu vit nøkta tostan eftir teirra tekno-rokki á ólavsøkukonsertini.

**Stórband og ábit í teltinum**

Sum nakað heilt nýtt, verður teltið í kommunuskúlagarðinum eisini tikið í nýtslu á konsertini. Tórshavnar Stórband spælir í teltinum, og til ber at keypa sær okkurt til matna.

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk

# Terji og Tim á ólavsøku



Tim Christensen, sum vit serliga kenna frá eyðkennislagnum í sjónvarpsrøðini »Nicolaj og Julie«, Right next to the right one«, verður uttan iva stóra trekkplástrið á Ólavsøkukonsertini í ár

Mynd: Scanpix

**Tim Christensen verður høvuðsnavnið á eini av teimum mest lovandi Ólavssøkukonsertunum í nógv ár. Hetta váttar Føroya Undirhaldstónleikarafelag fyri Sosialinum. Danski gittargudurin, sangarin og sangskrivarin, endar sína summarrundferð í Føroyum, ein rundferð sum m.a. fevnir um tær ótrúliga vælumtóktu Grønu konsertirnar**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Umframt danska høvuðsnavnið verður ein annar danskur bólkur við, tað er Supersonic, sum er nýggi bólkurin hjá Chasesangaranum Edmund Jakobsen.



*Terji Rasmussen og góðu gomlu Føstufressarnir verða eisini millum høvuðsnøvnini á Ólavsøkukonsertini*

Eisini verða nakrir av bestu føroysku bólkunum at hoyra. Føroyska høvuðsnavnið er upprunaliga útgávan av Terja og Føstufressum. Go Go Blues verða eisini við, umframt Synarchy, Paradox, Side Effect, Dejavu og Eager to Please

### Ein maður fyri menn og kvinnur

Tim Christensen er kanska størsta navn í donskum tónleiki í nýggjari tíð. Í fyrru helvt av 90'árunum legði hann allar rokkelskarar fyri føtur sínar við rokkbólkinum Dizzy Mizz Lizzy, sum eisini gjørdi um seg uttan fyri Danmark.

Síðan Dizzy Mizz Lizzy gavst, hevur Tim Christensen givið fleiri fløgur út í egnum navni. Tann seinasta av hesum, Honey Burst, vísti ein nógv friðarligari Tim Christensen, serliga var tað lagið Right next to the right one«, sum hittaði stórt í Danmark. Eisini í Føroyum var lagið ein landaplága. Tað gjørdi m. a. veruliga um seg á 15 teimum bestu.

Lagið var eyðkennislag í sjónvarpsrøðini »Nikolaj og Julie«, og sjónvarpsrøðin og friðarligi tónleikurin gjørdi Tim Christensen væl umtóktan eisini millum kvinnur.

### Bestu ljóðumstøður

Ólavsøkukonsertin hevur ligið í samráðingum við Tim Christensen leingi, men serliga tøkniligu krøvini hava verið stór. Men hesir trupulleikar eru nú loystir. Partar av ljóðútgerðini verða leigaðir úr Danmark, eitt nú verður tann ljóðblandingspulturin, sum Queen brúka á síni rundferð brúktur á ólavsøkukonsertini.

Eisini verða bestu ljóðmenn í landinum og onkur úr Danmark brúktir. Kaj Johannesen formaður í FUT sigur, at tað er týdningarmikið at karmarnir verða so góðir sum møguligt. Hóast Tim Christensen hevur sínar egnu ljóðmenn við, so skulu góðir ljóðmenn tryggja, at eisini hinir bólkarnir ljóða væl. Alexandur Gaard, Jón McBirnie, Jónas Bloch Danielsen og Ulysseus Bloch skulu tryggja góðskuna. Hetta eru alt menn við sera nógvum royndum. Teir tríggir føroysku munnu vera teir bestu í landinum, meðan Ulysseus er dani og hevur arbeitt sum ljóðmaður í danska tónleikaídnaðinum í nógv ár.

### Terji og Føstufressar

Terji og Føstufressar góvu fyrst í 90'árunum kanska bestu føroysku fløguna nakrantíð út, henda manningin, sum telir nakrar av bestu føroysku tónleikarunum, eru teir upprunaligu handverkararnir aftan fyri løg sum »Mamma«, »Lívið er okkara gáta«, »Kvøld á Tinganesið«, »Apokalypsa« og »Á ferð til dreymaland«.